

FAKTA

Make Up Store er ein hin skjótast vaksandi svenska fyritøkan við omanfyri 170 handlum í 22 londum. Hvønn mánað lata 2-4 nýggir handlar upp kring heimin.

39 ára gamli sviin, Mika Liias, er maðurin handan Make Up Store. Merkið varð upprunaliga ætlað professionellum make-up artistum. Men eftirspurningurin frá øðrum gjørdist so stórur, at røðin so líðandi víðkaði kundaskaran til eisini at umfata til at røkka øllum frá professionellum til teenagaran.

make-up handil. Umframt útbúgvingina sum make-up artistur, er hon eisini stylistur og kosmetologur. Og við drúgvum starvsroyndum, eitt nú frá Mac í Magasin á Kongens Nytorv, sum makeup artistur hjá TV2 og sum viðurkendur frílansari við nógvum kendisuppgávum í Danmark, metti fyritøkan, at grundarlagið var í lagi.

**Skeið og limaskapur**

Make Up Store er ikki bara ein handil, har til ber at keypa vørurnar. Fyritøkan mennir alla tíðina nýggj ting, og stórur dentur verður lagdur á tann partin, sum eitur vegleiðing og undirvísing í at brúka make-up.

Tað verður bæði undirvíst og smikað til dagligt niðri í handlinum, men eisini í erva, har tær hava innrættað eina salong til skeiðsvirksemi av ymsum slag. Bæði fyri einstaklingar og bólkar, so sum bindiklubbar og limir í Make Up Store klubbanum.

Tær greiða frá, at øll kunnu gerast limir í Make Up Store klubbanum. Fyrimunurin er tá, at tú fært tilboð og nýggjheitirnar áðrenn onnur, umframt at tú verður boðin við til serlig limatiltøk.

Fyrsti næmingurin hjá Miriam verður tó læraralærda systirin og makkarin Hanna, sum altíð hevur havt stóran áhuga fyri make-up, men sum nú kemur í læru hjá Miriam.

So framyvir nýtast vit ikki at leita okkum út um landoddarnar eftir júst tí rætta bláa litinum til neglirnar ella eyguni. Kongagøta hevur heilt vist eisini kongablátt á hillunum.

*Rigmor Dam*

*Myndir: Jens Kr. Vang*

